KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 23.11.2023 kl. 16:00
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
88/23	23/01091-2	Áseting av fundardøgum Klaksvíkar býráðs í 2024
89/23	23/00949-43	Fíggjarætlan 2024, Klaksvíkar Býráð - *seinna viðgerð*
90/23	23/00572-7	Sølutorg o.a
91/23	23/01320-1	Byggisamtyktarbroyting fyri sølutorg, almenn vesi íbúðir o.a.
92/23	23/01221-1	Byggisamtyktarbroyting fyri B1 og D1 á Borðoyarvík
93/23	23/01104-2	Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 34 í Árnafirði
94/23	23/01302-2	Umsókn um samanlegging - matr.nr. 932a og 931
95/23	21/01789-89	Marknaumskipan ísb. við verkætlanina á Fossum
96/23	23/01367-1	Dagstovna- og frítíðarskúlagjald strikast í desember 2023; eykajáttan
97/23	23/01227-1	Flyting av játtan, Ítróttarøkið – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
98/23	23/01093-4	Húsið, tørvur á meirjáttan - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
99/23	23/01281-3	Keyp av lendi
100/23	23/01032-1	Áramálsviðbøtur

Til viðgerðar

88/23
23/01091-2 Áseting av fundardøgum Klaksvíkar býráðs í 2024

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	88/23

Frágreiðing um málið:
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2024: 25. januar, 22. februar, 21. mars, 24. apríl, 30. mai, 27. juni, 26. september, 31. oktober, 28. november og 19. desember.

Fundir Klaksvíkar býráðs verða vanliga hildnir hósdag í býráðshøllini.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

> ***§ 13.*** *Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Tilmælið, dagf. 16-11-2023, einmælt samtykt.

89/23
23/00949-43 Fíggjarætlan 2024, Klaksvíkar Býráð - seinna viðgerð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	21.11.2023	94/23
2 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	89/23

Frágreiðing um málið:
Hervið verður uppskot til fíggjarætlan 2024 lagt fyri fíggjarnevnd og Klaksvíkar Býráð til viðgerð og støðutakan.
Á temafundinum hin 17. november um íløgupartin varð samtykt at seta íløgurnar til 53,5 mió. kr.
Samtykt varð eisini at lækka raksturin 1,2 mió. kr. og at hækka inntøkurnar 4,41 mió. kr.
Við hesum verður úrslitið áðrenn íløgur 61,5 og úrslit eftir íløgur 8 mió. kr. Avlopið fer til avdráttir.
Uppskotið javnvigar sostatt við kr. 0.

Uppskot er lagt fram um, at foreldur skulu sleppa undan at rinda ansingargjald í januar. Tí verður mælt til at hækka játtanina til barnaansing við 700 tkr. Upphæddin er ikki innbygd í tølini niðanfyri.

Rakstrarstað (1.000)	Uppruna ætlan 2023	Æ2024 - samtykt 23. okt 2023	Broyting 17-11-2023	Æ2024 til 2. viðgerð	Munur Æ2023 og Æ2024	Munur %
Inntøkur	328.876	348.290	4.410	352.700	23.824	7,2
Rakstur	255.348	273.971	-1.200	272.771	17.423	6,8
	73.528	74.319	5.610	79.929	6.401	0,4
Rentur og rentustuðul	12.200	18.400	0	18.400	6.200	50,8
Úrslit áðrenn íløgur	**61.328**	**55.919**	**5.610**	**61.529**	**201**	**3,6**
Íløgur	51.250		53.517	53.517	2.267	4,4
Úrslit áðrenn avdráttir	10.078		-47.907	8.012		
Avdráttir	10.078			8.012		
Úrslit	**0**			**0**		
Lyklatøl (%)						
Lutfall rakstur og inntøkur	77,6	78,7		77,3		
Lutfall rakstur+rentur og inntøkur	81,4	83,9		82,6		

Inntøkurnar eru mettar til 352,7 mió. kr. og raksturin 272,8 mió. kr. Hetta er ein hækking upp á ávikavist 7,2% og 6,8% í mun til fíggjarætlanina 2023.

Rakstur býttur á høvuðspostar:

Rakstrarstað	Æ2024 17-11-2023	Tillagingar 20-11-2023	Æ2024
Skattainntøkur	352.700.000	0	352.700.000
Kommunufyrisiting	28.621.000	0	28.621.000
Almanna- og heilsumál	103.483.170	-170	103.483.000
Børn og ung	60.668.154	-154	60.668.000
Undirvísing	14.859.215	-215	14.859.000
Mentan og frítíð	19.355.292	-292	19.355.000
Teknisk mál	27.881.390	-390	27.881.000
Kommunal virki	17.902.725	-725	17.902.000
	272.770.946	-1.946	272.769.000
	79.929.054	1.946	79.931.000
Stuðul til rentuútreiðslur	7.000.000	0	7.000.000
Rentugjaldingar(útreiðslur)	11.500.000	0	11.500.000
Rentugjaldingar(inntøkur)	-100.000	0	-100.000
	11.400.000	0	11.400.000
Samlaðar útreiðslur	61.529.054	1.946	61.531.000

Íløgur	53.517.000		53.517.000
Úrslit áðrenn avdráttir	8.012.054	1.946	8.014.000

Rentustuðul og rentur av lánum eru mett til ávikavist 7 mió. kr. og 11,4 mió. kr.

Niðanfyri er útgreining av inntøkunum. Har eru tillagingar gjørdar ísbv. barnafrádrátt og eldraøkið – eftirlønarskatt og DIS/FAS. Orsøkin er, at barnafrádrátturin verður avroknaður saman við kommunuskattinum, og at FMR er komin við nýggjum metingum av eftirlønarskatti og DIS/FAS.

Rakstrarstað	Æ2023	Æ2024 - 1	Broyting 17-11-2023	Æ2024	Tillagingar 23-11-2023	Æ2024 - 1	Æ2024 - 1	Broyting pct
Kommunuskattur	246.196	263.458	2.595	266.053	-653	265.400	19.204	7,8
Húsaleiguskattur	0	0		0		0	0	
Felagsskattur	21.500	17.500		17.500		17.500	-4.000	-18,6
Barnafrádrátt	0		-1.300	-1.300	1.300	0	0	
Skattur av eftirlønarinngjøldum	50.763	55.525		55.525	-56	55.469	4.706	9,3
Flyting vegna DIS, FAS	10.417	11.807		11.807	-591	11.216	799	7,7
Tøkugjald			615	615		615	615	
Tilfeingisgjald	0		2.500	2.500		2.500	2.500	
Skattainntøkur	328.876	348.290	4.410	352.700	0	352.700	23.824	7,2

Útgreining av íløgunum, sum vórðu samtyktar á felags nevndarfundinum 17. november:

Grein	Íløgur	Æ 2024
1	Fastogn (býráðshúsið)	3.000
3	Útiøki barnagarðar	1.500
4	Prosjekt Gregoriusen bygningur	1.000
4	Útiøki á Skúlatrød	500
5	Húsarhaldsskúli	8.000
5	Hornaskýlið	4.500
5	Dypparaneyst	300
6	Byggibúning á Fossum	5.000
6	Spillivatnsútbygging (kloakk)	4.500
6	Vegir íløga	4.500
6	Lendisarbeiði viðv. nýggjum hotelli	4.000
6	Vegur + parkeringspl. við Stangavegin	3.717
6	Ferðslutrygd	1.500

6	Byggibúning bústaðir	1.500
6	Ídnaðarøkið undir Hamri	1.200
6	Byggib miðbýur- skipan av parkering	1.000
6	Sparkivallir/spælipláss	600
7	Kaisíðan í Árnafirði	4.500
7	Bátahylur Borðoyarvík	2.700
	Samanlagt	53.517

Nettoskuld
Við ársbyrjan 2022 var nettoskuldin 80 mió. kr. omanfyri skuldarmarkið. Í 2023 eru reglurnar um uppgerð av nettoskuld broyttar, so nú verða inntøkurnar ísbv. eldraøkið (forskatting, DIS, FAS) tiknar við í útrokningini av nettoskuldini. Tað merkir, at nettoskuldin lækkar á leið 60 mió. kr. og er einar 20 mió. kr. omanfyri skuldarmarkið.

Dagførda fíggjarætlanin vísir 19,8 mió. kr. í halli, men seinasta metingin sigur, at vit ikki megna at brúka allar íløgurnar, og saman við merinntøkum frá persónsskatti er útlit fyri, at við ársenda 2023 er nettoskuldin komin niður á skuldarmarkið.

Roknast kann tó við, at ikki brúktar íløgur skulu flytast frá 2023 til 2024 at brúka, og tað ávirkar nettoskuldina, men roknskaparteknisk er nettoskuldin við ársenda 2023 ájavnt við eina álíkning.

Fyrisitingin mælir politisku skipanini til at halda fast við samtyktu afturgjaldsætlanina hjá Klaksvíkar Býráði frá 23. februar 2023 um, at í árunum 2024 – 2028 verða settar 30 mió. kr.
av árliga til rentur og avdráttir (sí málsnr. 23/00233-1).

Burðardygd og heimsmálini:
Tað er týdningarmikið, at burðardygd og Heimsmálini verða tikin við í arbeiðið við fíggjarætlanini fyri 2024, og at havt verður í huga langtíðaravleiðingar í bæði rakstrarpartinum og íløgupartinum við atliti at burðardyggari menning av Klaksvíkar kommunu. Neyðugt er at tryggja, at grundleggjandi tænastur til borgarar og onnur í kommununi verða tryggjaðar á haldførari grund, og at íløgur taka støði í tøka fíggjarliga tilfeinginum og í framtíðartørvinum í kommununi.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um kommunustýri, grein 39.

Fíggjarligar avleiðingar:
Verandi uppskot vísir 8 mió. kr. í avlopi áðrenn avdráttir. Um uppskotið at hækka játtanina til barnaansing við 700 tkr. ísbv. at foreldur sleppa undan at gjalda ansingargjald í januar verður samtykt, verður avlopið 7,3 mió. kr.

Verandi lániavtalur siga, at rindast skulu áleið 18 mió. kr. í avdráttum. Tí verður neyðugt við umfígging í 2024.

Tilmæli:
Frammanfyri lýsta uppskot til fíggjarætlan hjá Klaksvíkar kommunu verður hervið lagt fyri Fíggjarnevnd og Býráð til viðgerðar og støðutakan. Skattaprosent og barnafrádráttur skulu eisini ásetast.
Og støða skal eisini takast til at hækka játtanina til barnaansing við 700 tkr. ísbv. at foreldur sleppa undan at gjalda ansingargjald í januar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. november 2023:
Málið verið til kunningar.

Tekniska Nevnd 15. november 2023:
Málið verið til kunningar.

Fíggjarnevndin 21. november 2023:
Málið verið til kunningar.

Fíggjarnevndin 21. november 2023:
Nevndin tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan, sum lýst í tilmælinum, dagf. 20-11-2023. Nevndin tekur eisini undir við at hækka játtanina til barnaansing við 700 tkr. ísbv. at foreldur sleppa undan at gjalda ansingargjald í januar.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Atkvøtt varð um tilmælið frá Fíggjarnevndini 21-11-2023; tað varð einmælt samtykt.

Sostatt er fíggjarætlan Klaksvíkar Býráðs fyri 2024 einmælt samtykt við hesum tølum:

Klaksvíkar kommuna, fíggjarætlan 2024

		tkr.
	Inntøkur	**352.700**
§ 1	Kommunal fyrisiting	28.621
§ 2	Almanna- og heilsumál	103.483
§ 3	Børn og ung	61.368
§ 4	Undirvísing	14.859
§ 5	Mentan og frítið	19.355
§ 6	Teknisk mál	27.881
§ 7	Kommunal virki	17.902
	Rakstrarútreiðslur	**273.469**
	Rakstraravlop	**79.231**
	Rentustuðul	7.000
	Rentur	11.400
		18.400
	Úrslit áðrenn íløgur	60.831
	Íløgur	53.517
	Avlop	**7.314**

	Útgreining (íløgur)	**tkr.**
§ 1	Fastogn (býráðshúsið)	3.000
§ 3	Útiøki barnagarðar	1.500
§ 4	Prosjekt Gregoriusen bygningur	1.000
§ 4	Útiøki á Skúlatrøð	500
§ 5	Húsarhaldsskúli	8.000
§ 5	Hornaskýlið	4.500
§ 5	Dypparaneyst	300
§ 6	Byggibúning á Fossum	5.000
§ 6	Spillivatnsútbygging (kloakk)	4.500
§ 6	Vegir íløga	4.500
§ 6	Lendisarbeiði viðv. nýggjum hotelli	4.000
§ 6	Vegur + parkeringspl. við Stangavegin	3.717
§ 6	Ferðslutrygd	1.500
§ 6	Byggibúning bústaðir	1.500
§ 6	Ídnaðarøkið undir Hamri	1.200
§ 6	Byggib miðbýur- skipan av parkering	1.000
§ 6	Sparkivallir/spælipláss	600
§ 7	Kaisíðan í Árnafirði	4.500
§ 7	Bátahylur Borðoyarvík	2.700
	Samanlagt	53.517

Harumframt einmælt samtykt at taka undir við einum **skattaprosenti** upp á **20,75** og einum **barnafrádrátti** upp á **6.500 kr.**

90/23
23/00572-7 Sølutorg o.a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.11.2023	43/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.11.2023	100/23
3 Mentanarnevndin	14.11.2023	68/23
4 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	14.11.2023	39/23
5 Havna- og Vinnunevndin	15.11.2023	55/23
6 Tekniska Nevnd	15.11.2023	69/23
7 Fíggjarnevndin	21.11.2023	96/23
8 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	90/23

Frágreiðing um málið:
Fyri nøkrum árum síðani vendi ein byggifyritøka sær til kommununa við fyrispurningi um at byggja smærri íbúðir millum Nólsoyar Pálshúsið og gamla Róðrarneystið. Kommunan metti ikki, at rúm var fyri einum slíkum bygningi har og vendi sær til arkitektin, sum hevur gjørt miðbýarætlanina. Eftir samskifti er komið fram til, at besta loysnin er at fylla út niðanfyri Effo-støðina, soleiðis at byggingin liggur út ímóti vágni.

Málið hevur ligið stilt eina tíð, men nú er aftur gongd komin á. Kommunan hevur leingi havt ynskir um at fáa bygt eitt sølutorg og almenn wc við bátabrúgvarnar. Somuleiðis er ein fyrispurningur komin frá Bátafelagnum, sum manglar felagshølir. Tískil liggja tekningar nú á borðinum frá arkitekti, har man á veghædd hevur sølutorg, almenn wc og felagshølir, og á 1. hædd hevur íbúðir. Hesin bygningurin hóskar inn í miðbýarætlanina, tí hann hevur opið (útvent) virksemi á veghædd, og íbúðir á ovaru hæddini.

Verkætlanin kann skipast upp á fleiri mátar. Mett verður, at skynsamasta loysnin er, at byggiharrin kemur at eiga allan bygningin og útleigar veghæddina til ávikavist KK og Bátafelagið. Møguleiki er fyri at gera eina avtalu um, at kommunan hevur forkeypsrætt upp á veghæddina. Um bygningurin skal rúmast á økinum, er neyðugt við eini útfylling, sum verður 1120 m^2, til hetta krevst 4300 m^3 av gróti.

Neyðugt er, at kommunan tekur støðu til ognarviðurskiftir, endamál av nýtslu, kommunala leiklutin v.m., hetta arbeiðið fer í gongd, um byggisamtyktarbroytingin verður framd.

Bygningurin kemur at standa á leiguøki.

Fyri at verkætlanin skal fremjast, verður annars neyðugt at fremja hesi stig:
- byggisamtyktarbroyting
- umhvørvisgóðkenning/árinsmeting
- projektering av útfylling

Burðardygd og heimsmálini:
Av tí at hesin bygningurin hevur fleiri funktiónir, so er hetta ein verkætlan, ið fevnir breitt.
Niðara hæddin verður til opið (útvent) virksemi, so sum felagshølir og sølutorg, meðan ovara hæddin verður brúkt til bústaðir. Tískil fevnir hendan verkætlanin um hesi heimsmál:

- Heimsmál nr. 9 Vinna, nýskapan og undirstøðukervi
    - Heimsmál nr. 11 Burðardyggir býir og bygdir (undirmál: Fyri 2030 skal býarmenning gerast meira inkluderandi)

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Um verkætlanin skal fremjast, má peningur setast av í fíggjarætlanini fyri 2024.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur støðu til, um:

- kommunan skal fara í samráðingar við byggifyritøkuna, sum sendi fyrispurningin inn í 2017, og sum hevur verið við í verkætlanini líka síðani
- verkætlanin skal bjóðast út alment, so at fleiri fáa møguleikan fyri at bjóða uppá verkætlanina
    - umsitingin mælir til at bjóða verkætlanina út alment.

Sum nevnt omanfyri, skal greiða fáast á byggisamtyktarbroyting, umhvørvisgóðkenning, projektering av útfylling, og øðrum viðurskiftum viðvíkjandi ognarviðurskiftum, áðrenn verkætlanin fer í gongd.

Ferðslunevndin 13. november 2023:
Nevndin varð kunnað um verkætlanina. Nevndin mælir til, at ferðsluligu viðurskiftini (parkering og atkomuviðurskifti) verða betur lýst.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. november 2023:
Ein meiriluti, GvK, JCC og OáL, tekur undir við HaVN 23-08-2023, FíN 24-10-2023 og FeN 13-11-2023.
Ein minniluti, JS, mælir til fáa eitt løgfrøðiligt upprit um heimild fyri útleigu, samstundis sum leigusáttmáli verður gjørdur um part av bygninginum, áðrenn fíggjarnevndarfundin 21. nov.
Ein annar minniluti, SVJ, tekur støðu í býráðnum.

Mentanarnevndin 14. november 2023:
Ein meiriluti, JCC, GvK og ASJ taka undir við meirilutanum í UBN, dagf. 13-11-2023
Ein minniluti, SVJ, tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 14. november 2023:
Ein meiriluti, JCC, GvK og OáL, tekur undir við meirilutanum í MeN, dagf. 14.11.2023.
Ein minniluti, SVJ, tekur støðu í býráðnum.

Havna- og Vinnunevndin 15. november 2023:
Nevndin tekur undir við UBN dagf. 13-11-2023.

Tekniska Nevnd 15. november 2023:
Nevndin tekur undir við meirilutanum í UBN 13-11-2023.

Fíggjarnevndin 21. november 2023:
Nevndin tekur undir við TN 15-11-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá ASB: *Tikið verður undir við tilmælinum, men at staðsetingin verður í longu útfylta økinum millum EFFO og FK*; tað fall við 1 atkvøðu fyri (ASB) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ÓML); JS, SVJ og TJL atkvøddu ikki.

Atkvøtt varð síðani um tilmælið frá FíN 21. nov. 2023; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, Oál, JCC, EÓP, JS, TJL og ÓML) og 2 atkvøðum ímóti (SVJ og ASB).

91/23
23/01320-1 Byggisamtyktarbroyting fyri sølutorg, almenn vesi íbúðir o.a.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.11.2023	44/23
2 Heilsunevndin	13.11.2023	34/23
3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.11.2023	101/23
4 Mentanarnevndin	14.11.2023	69/23
5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	14.11.2023	40/23
6 Havna- og Vinnunevndin	15.11.2023	56/23
7 Tekniska Nevnd	15.11.2023	70/23
8 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	91/23

Frágreiðing um málið:
Víst verður til ætlanina um at útfylla og skapa karmar fyri bygningi at rúma sølutorgi, almennum vesum, hølir til áhugafelagsskapir og bústaðir.



Visualisering

Um verkætlanin skal fremjast, er neyðugt at víðka byggisamtyktina og stovna ein nýggjan økispart. Nýggi økisparturin E5 er uml. 1400 m^2 til støddar. Sí hjálagt *Uppskot til økisblað*. Økisblaðið tekur støði í skitusuppskotinum gjørt av Ósbjørn Jacobsen, arkitekti.



E5

Tekniska umsiting hevur umrøtt skitsuuppskotið og hevur hesar viðmerkingar:
- hóskar og er í tráð við miðbýarætlanina
- gott at blanda almenn endamál og bústaðir.
- kann blíva ein maritim perla fyri býin við almennari bryggju
- góðar umstøður til sølutorg.
- verkætlanin hevur ikki nóg mikið av parkeringsplássum til virksemið í bygninginum
    - einans 10 parkeringspláss (íbúðirnar).
    - væntast kann, at tað verður trupult at rúma manglandi parkering á almenna parkeringsplássinum millum EFFO og FK.
    - ferðsluligi parturin við inn- og útkoyring við EFFO eigur at verða lýstur betur
    - má ikki órógva verandi virksemi hjá EFFO

Burðardygd og heimsmálini:
11. Mál. Gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Uml. 5000-8000 kr. at lýsa fyri byggisamtyktarbroyting.

Tilmæli:
Treytað av, at mál *Sølutorg o.a* verður samtykt av Klaksvíkar býráð, verður mælt til at játta umsitingini heimild at fara undir byggisamtyktartilgongdina.

Ferðslunevndin 13. november 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-11-2023, og mælir til, at ferðsluligu viðurskiftini (parkering og atkomuviðurskifti) verða betur lýst.

Heilsunevndin 13. november 2023:
Málið hevur verið til kunningar, 13-11-23.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. november 2023:
Nevndin tekur undir við FeN 13-11-2023.

Mentanarnevndin 14. november 2023:
Nevndin tekur undir UBN, dagf. 13-11-2023

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 14. november 2023:
Nevndin tekur undir við MeN, dagf. 14.11.2023.

Havna- og Vinnunevndin 15. november 2023:
Nevndin tekur undir við Trivnaðarnevndini E&B, dagf. 14-11-2023.

Tekniska Nevnd 15. november 2023:
Nevndin tekur undir við HaVN 15-11-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Tilmælið frá Teknisku Nevnd 15. nov. 2023 samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS, SVJ, TJL og ÓML) og ongari atkvøðu ímóti; ASB atkvøddi ikki.

92/23
23/01221-1 Byggisamtyktarbroyting fyri B1 og D1 á Borðoyarvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.11.2023	102/23
2 Havna- og Vinnunevndin	15.11.2023	59/23
3 Tekniska Nevnd	15.11.2023	72/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	92/23

Frágreiðing um málið:
Staðfest er, at tað súgar sera illa í bátahylinum, og av tí sama eru fleiri skaðar skrásettir. Hetta hevur neiliga ávirkan á virksemi og umstøðurnar hjá bátaeigarunum
Umsitingin hevur fingið ráðgeva at hyggja nærri at bátahylinum, um hvat kann gerast fyri at betra um umstøðurnar. Víst verður á, at við at leingja og smalka molan/brimgarðin á bátahylinum, fer tað at bøta munandi um umstøðurnar í bátahylinum.

Uppskot frá ráðgeva

Fyri at fremja útbyggingina av molanum í bátahylinum á Borðoyarvík er neyðugt at broyta byggisamtyktina. Hetta krevur, at tað verður økt um økispartin B1 (vinnuøki).
Somuleiðis verður lagt upp til at regulera í økismarkinum millum B1 og D1, hetta verður gjørt fyri at dagføra byggisamtyktina eftir verandi viðurskiftum; tí trý neyst liggja í B1, hesi hóska seg betur at liggja í D1 enn í B1.

Talan er um eina øking av B1 á uml. 1500 m^2 (tá er nýggi parturin av D1 trektur frá) og eina øking av D1 á uml. 550 m^2.

Broytingaruppskot

Byggisamtyktarbroytingin er treytað av, at fígging finst til fremjanina av útfyllingini, og neyðug loyvir (umhvørvisgóðkenning) verða játtað.

Burðardygd og heimsmálini:
Mál 9: Byggja sterk undirstøðukervi, virka fyri inkluderandi og burðardyggari ídnaðarmenning og eggja til nýhugsan
Mál 11: Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Útreiðslur ísb. við byggisamtyktarbroytingina uml. 8000 kr. (konta *býarplansútreiðslur*)
Fíggjarviðurskiftir viðv. útfylling og projektering verða ikki viðgjørd í hesum máli. Víst verður til upprunamál 23/00697.

Tilmæli:
Uppskot um byggisamtyktarbroyting verður latið nevnd og býráð til umrøðu og støðutakan, treytað av, at fígging finst til fremjanina av útfyllingini *(mál 23/00697)*.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. november 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 26-10-2023.

Havna- og Vinnunevndin 15. november 2023:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 13-11-2023.

Tekniska Nevnd 15. november 2023:
Nevndin tekur undir við HaVN 15-11-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Tilmælið frá Teknisku Nevnd 15. nov. 2023 einmælt samtykt.

93/23
23/01104-2 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 34 í Árnafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Árnafjarðarnevndin	28.11.2023	10/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.11.2023	110/23
3 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	93/23

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður tann 11. sept. 2023 um kommununnar ummæli til sundurbýti av matr. 34 í Árnafirði.
Umframt 2 gl. í matr.nr. 90 uttangarðs, liggur ognin innangarðs í tveimum lutum:

- Grundøki í aðru rød omanfyri Vaglið – Fornagøta 4 (305 m^2)
- Neystagrund í aðru rød niðanfyri Vaglið (18 m^2)

Byggisamtyktarligu ásetingarnar eru:

- Fornagøta 4: Økispartur A23 – blandað bygging – minsta mark grundøkjavídd: 300 m^2
- Neystagrundin: Økispartur D27 – grønt øki – fult bygt. Minsta mark grundøkjavídd ikki definerað.

Eigarin av matr.nr. 34 søkir nú um at fáa ognina býtta sundur soleiðis, at sethúsaognin og neystaognin verða hvør sín matrikul.

Burðardygd og heimsmálini:
Nr. 11

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 um matrikulering og sundurbýti við seinni broytingum.
Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Vísandi til omanfyri standandi hevur Tekniska Fyrisiting onki í móti, at sundurbýti verður játtað, - tó eigur umsøkjarin at verða kunnaður um økispart D27 í byggisamtyktini, sum m.a. ásetur, at økið er fult bygt, og at bert endurreising av verandi bygningum kann verða loyvd.
Í samband við sundurbýtið verður umsøkjarin somuleiðis at greina, hvar uttangarðsparturin skal hoyra til.

(Skotið verður upp, at málið verður viðgjørt í nevnd og býráði hetta umfarið, men ikki sent Umhvørivsstovuni til góðkenningar fyrrenn viðmælið er staðfest í Árnfjarðarnevndini seinni í mánaðinum)

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. november 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 31-10-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Tilmælið frá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndini 13. nov. 2023 einmælt samtykt.

94/23
23/01302-2 Umsókn um samanlegging - matr.nr. 932a og 931

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.11.2023	109/23
2 Havna- og Vinnunevndin	15.11.2023	K-19/23
3 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	94/23

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður tann 31. okt. 2023 um kommmununnar ummæli til samanlegging av neystaøkjunum matr.nr. 932a og 931 við Borðoyarvík.
Nú sami eigari er til matr.nr. 931 og 932a, er grundarlag fyri tí umskipan, sum býráðið samtykti at viðmæla longu í april 2022.

Burðardygd og heimsmálini:
-

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommuna bert ummælandi

Tilmæli:
Mælt verður til at viðmæla umsóknini

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. november 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 31-10-2023.

Havna- og Vinnunevndin 15. november 2023:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Tilmælið frá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndini 13. nov. 2023 einmælt samtykt.

95/23
21/01789-89 Marknaumskipan ísb. við verkætlanina á Fossum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.11.2023	K-6/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.11.2023	104/23
3 Tekniska Nevnd	15.11.2023	K-39/23
4 Fíggjarnevndin	21.11.2023	97/23
5 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	95/23

Frágreiðing um málið:
Neyðugt er at gera nakrar matrikulbroytingar í útstykkingini á Fossum (grundstykkini niðan Horn 48 og 50), m.a. tí ein geiri millum niðan Horn 46 og niðan Horn 48 má nýtast ísv. spillivatnætlanina í økinum, og tí íbindingin millum vegirnar skal gerast betri og tryggari.

Hetta kann loysast soleiðis, at eigararnir av niðan Horn 46 fáa í boðið at keypa ein 2,5m breiðan geira, og ein sjálvstøðugur geiri á 2,5 m verður útlagdur til leiðingar sunnanfyri nýggja markið hjá niðan Horn 46. Annað grundstykkið (NH50) verður slept, í staðin kemur eitt gott grundstykki (NH48) burtur út og eitt størri øki til fríøki, sum møguliga kann koma komandi stovni til góðar.



Møgulig loysn – eitt grundstykki

Burðardygd og heimsmálini:
Mál 11: Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

Fíggjarligar avleiðingar:
Mist inntøka: Upprunaprísur fyri niðan Horn 50: 446 m^2 x 1150 kr/m^2 = 512.900 kr.

Inntøka: Niðan Horn 48 eftir broyting: 470 m^2 x 1150 kr/m^2 = 540.500 kr.

Niðan Horn 46 fær í boðið at keypa geira á uml. 75 m^2

Tilmæli:

Mælt verður til at nevnd og býráð taka undir við, at
- strika grundstykki niðan Horn 50
- samtykkja lýstu marknaumskipan
- fara í samráðingar við eigaran av niðan Horn 46 um sølu av geira.

Ferðslunevndin 13. november 2023:
Tilmælið, dagf. 03-11-2023, verið til kunningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. november 2023:
Jóhanna C. Christiansen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-11-2023.

Tekniska Nevnd 15. november 2023:
Tilmælið, dagf. 03-11-2023, verið til kunningar.

Fíggjarnevndin 21. november 2023:
Nevndin tekur undir við UBN 13-11-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Jóhanna C. Christiansen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 21. nov. 2023 einmælt samtykt.

96/23
23/01367-1 Dagstovna- og frítíðarskúlagjald strikast í desember 2023; eykajáttan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	21.11.2023	92/23
2 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	96/23
3 Klaksvíkar Býráð		

Frágreiðing um málið:
Á temafundi II 17. november um fíggjarætlanina 2024 varð einmælt samtykt, at dagstovna- og frítíðarskúlagjaldið fyri november og desember 2023 skal strikast. Eftirfylgjandi er avgjørt, at talan heldur skal verða um gjøldini fyri desember 2023 og januar 2024, tí rokningarnar fyri november vóru sendar út, áðrenn samtyktin varð gjørd.

Til tess at hvør einstakur dagstovnur skal verða hildin skaðafríur og skal varðveita sína rakstrarjáttan óbroytta, er tørvur á fylgjandi:
- fyri at fíggja samtyktu strikingina av foreldragjaldinum fyri desember 2023 er tørvur á eini eykajáttan á 700.000 kr., sum verður fíggjað av tøka peningi kommununnar
- fyri at fíggja samtyktu strikingina av foreldragjaldinum fyri januar 2024 er tørvur á eini meirjáttan á 700.000 kr. í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2024, sum verður løgd fyri býráðið til endaliga samtykt hósdagin 23. november 2023.

Lógargrundarlag:
§ 41 í Kommunustýrislógini:
Stk. 1. Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

Stk. 2. Kommunustýrið kann tó um neyðugt veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað

Fíggjarligar avleiðingar:

Foreldragjald des 2023 - býtt á stovnar		
Rakstrarstað	**Des**	**Jan**
Dagrøktin	92	92
Fjallafípan	110	110
Blákollan	60	60
Barnahúsið Margit	61	61
Dr. Margrethu Barnagarður	113	113
Mylnuhúsið	68	68
Baldursbrá	36	36
Frítíðarskúlin Snjalla Bjalla	160	160
Tilsamans	**700**	**700**

Tilmæli:
Vísandi til samtykt á temafundi II tann 17. november 2023, verður mælt til at fíggja samtyktu strikingina av foreldragjaldinum fyri desember 2023 við eini eykajáttan á 700.000 kr., sum verður fíggjað av tøka peningi kommununnar.

Fíggjarnevndin 21. november 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-11-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 21. nov. 2023 einmælt samtykt.

97/23
23/01227-1 Flyting av játtan, Ítróttarøkið - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	17.10.2023	63/23
2 Fíggjarnevndin	24.10.2023	85/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	83/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	97/23

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. okt. 2023.

Burðardygd og heimsmálini:
Hetta málið stuðlar undir heimsmál nr. 3 at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlan 2023

Fíggjarligar avleiðingar:
Fluttar verða 527.375,- frá rakstrarstaðið 05246170120 til rakstrarstað 05246270192

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at flyta upphæddina til annað rakstrarstað.

Mentanarnevndin 17. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-10-2023

Fíggjarnevndin 24. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við MeN 17-10-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Annika S. Biskopstø tók ikki lut í viðgerðini vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 24-10-2023 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Annika S. Biskopstø tók ikki lut í viðgerðini vegna ógegni.
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 27. okt. 2023 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

98/23
23/01093-4 Húsið, tørvur á meirjáttan - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.10.2023	48/23
2 Fíggjarnevndin	24.10.2023	83/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.10.2023	85/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	98/23

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. okt. 2023.

Tilmæli:
Vísandi til viðfestu dagførdu fíggjaruppgerð, verður mælt til at tann har upplýsta upphæddin verður flutt millum kontur – frá barnaansing felags til Húsið – og at upphæddin verður staðfest í nevndarsamtyktini.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 17. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 09.10.23 og við viðfestu dagførdu skjølum dagfest 13.10.23, har mælt verður til at flyta kr. 220.000 millum kontur frá *barnaansing felags* til *Húsið*, ímeðan restin verður staðfest sum meirnýtsla hjá Húsinum fyri 2023.

Fíggjarnevndin 24. oktober 2023:
Nevndin tekur undir við B&U 17-10-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2023:
Tilmælið frá FíN 24-10-2023 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 27. okt. 2023 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

FRAMMANFYRI STANNDANI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

99/23
23/01281-3 Keyp av lendi

100/23
23/01032-1 Áramálsviðbøtur

Fundurin lokin kl. 20.15